# »Havnin í Skopun ikki nóg góð«

*Skiparin á Tróndi heldur, at umbyggingin av havnini í Skopun kundi verið nógv betri, um landsverkfrøðingurin hevði fylgt modellinum, sum gjørt varð frammanundan*



*Eyðun Holm, skipari á Tróndi, hyggur hugsunarsamur út av brúnni. Hann heldur at havnin í Skopun kundi verið betri*
**Mynd: Edvard Joensen**

STEFAN Í SKORINI

Landsverkfrøðingurin fór í fjør undir at umbyggja havnina í Skopun. Tað vísir seg aftaná, at henda umbyggingin kundi verið væl betri gjørd. Eitt betri úrslit kundi fingist, um modellið, sum ætlanin var at arbeiða eftir, hevði verið fylgt.

Skiparin umborð á Tróndi, Eyðun Holm, heldur, at ov lítið er komið burturúr, nú teir endiliga hava fingið ta tiltrongdu umbyggingina frá hondini.

Hann heldur, at best hevði verið um gjørt varð, sum modellið vísti.

Og Eyðun veit, hvat hann tosar um. Í mong Harrans ár hevur hann siglt um Skopunarfjørð og veit akkurát, hvussu viðurskiftini við havnalagið í Skopun eru.

Havnin hevði verið kyrrari enn longri. Landsverkfrøðingurin skoytti bara 40 metrar uppí molan, meðan modellið vísti 70 metrar. Um molin var longri hevði verið kyrrari inni í Havnini, og tað hevði súgað minni enn nú. Hetta hevði komið væl við í eini útróðrarbygd sum Skopun.

Modellið vísti eisini, at ein vinkul skuldi gerast úti á boganum, men tað er heldur ikki gjørt. Hetta hevði gjørt innsiglingina betri og tryggari, enn hon er nú.

Hví Landsverkfrøðingurin ikki fylgdi modellinum veit skiparin ikki at siga.

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og regn, Út á seinnapartin lækkar hann niður í sunnan, minkar vindin og yvirhøvur turt. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn. Seinnapartin stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og ælingur, men sunnudagin upp í ein strúk og regn. Hitin millum 8 og 12 stig.




Eitt lágtrýst, 983 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer eystureftir og dýpist.




Eitt djúpt lágtrýst, undir 976 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.




**Hitalagið mált frá 25./09. kl 06⁰⁰–26./09. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°C**
Minsti hiti máldur í september: ÷0,5° Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 25./09. kl 6⁰⁰–26./09. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í september: 96,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 21 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 17 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## Vestfalskyrrindi

24. sept.: Mánin næstur jørðini
27. sept.: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. sept. | 07.02 | 19.18 | 06.02 | 18.18 | 06.17 | 18.33 | 09.02 | 21.18 | 10.02 | 22.18 | 05.17 | 17.33 | 04.17 | 16.33 | 07.17 | 19.33 | 08.17 | 20.33 | 06.47 | 19.03 | 08.02 | 20.18 |
| 28. sept. | 07.34 | 19.52 | 06.34 | 18.52 | 06.49 | 19.07 | 09.34 | 21.52 | 10.34 | 22.52 | 05.49 | 18.07 | 04.49 | 17.07 | 07.49 | 20.07 | 08.49 | 21.07 | 07.19 | 19.37 | 08.34 | 20.52 |
| 29. sept. | 08.10 | 20.27 | 07.10 | 19.27 | 07.25 | 19.42 | 10.10 | 22.27 | 11.10 | 23.27 | 06.25 | 18.42 | 05.25 | 17.42 | 08.25 | 20.42 | 09.25 | 21.42 | 07.55 | 20.12 | 09.10 | 21.27 |
| 30. sept. | 08.43 | 21.01 | 07.43 | 20.01 | 07.58 | 20.16 | 10.43 | 23.01 | 11.43 | – | 06.58 | 19.16 | 05.58 | 18.16 | 08.58 | 21.16 | 09.58 | 22.16 | 08.28 | 20.46 | 09.43 | 22.01 |

Kelda: Skipalistin 2000

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo